# Hvalbingar berjast ímóti náttúruni

**Hvalbiar Kommuna roynir at beina eina á burtur úr síni natúrligu legu, men tað halda fólk verða bæði vera burturspiltan pening og at gera seg inn á náttúruna**

GREVSTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað eru ójavnar meininginar um tað, sum Hvalbiar Kommuna hevur gjørt á sandinum í Nesi. Summi halda, at tað er bæði burturpilt arbeiði og at gera seg inn á náttúruna. Borgarstjórin sigur, at tað gravingin er fyri at forða sandinum í at gerast so stórur, at hann verður til fortreð fyri bátahylin og neystini*

**Hvalba:** Nú er Hvalbiar Kommuna farin í hernað ímóti sjálvari náttúruni.

Tað halda í hvussu so er fólk í Nesi í Hvalba.

Býlingurin í Nesi liggur nakað uttanfyri sjálva bygdina í Hvalba. Í Nesi er sera náttúruvakurt við ein umstórum dali, eini á, sum rennur oman ígjøgnum dalin oman á tann stóra sandin og á sjógv.

Men í bygdaráðnum í Hvalba eru tey ikki nøgd við tað nátúrligu leguna, sum áin hevur funnið sær omaneftir sandinum og tí hevur ein gravimaskina nú í eina tíð staðið á sandinum og grivið í eini roynd at flyta ánna longur norður eftir.

Hetta síggja nógv fólk í Nesi í Hvalba ikki at síggja nakra sum helst meining í.

Ein av teimum, sum eru ógvuliga ónøgdir við framferðina hjá kommununi, er Álvur Berg, sum sjálvur býr næstur sandinum.

– Tað er hvørt einasta ár, at kommunan grevur og grevur fyri at fáa ánna at flyta seg norðureftir. Hetta er at berjast ímóti nattúruni, tí áin finnur skjótt sína natúrligu legu aftur – men so verður bara byrjað av nýggjum at grava árið eftir. Hann veit ikki, hvat allur hesin grevsturin skal gera gott fyri. Men hann heldur í hvussu so er, at kommunan skuldi givið sandinum, og ánni, frið til at laga seg eftir náttúrini, tí hann dugur ikki at síggja, at hon er til nakran sum helst ampa.

– Tvørturímóti er sandurin, áin, ósin og vatnið ein nattúruperla, bæði hjá børnum og vaksnum.

– Men hvørt einasta ár oyðileggur kommunan hesa perluna við at grava alt upp til eitt dýkið, siga tey í Nesi í Hvalba.

### Sandurin má steðgast

Levi Niclasen, borgarstjóri í Hvalba er ikki samdur. Og tað er eisini hansara fatan, at yvirhøvur eru nesfólk fegin um tað, sum er gjørt.

Hann sigur, at tað er fyri at forða sandinum at veksa so nógv, at roynt verður at beina áina longur norðureftir.

– Tað vísir seg, at tá ið áðin rennur framvið syðra landinum, legst so nógv afturat sandinum.

Bygdaráðið stúrir fyri, at endin verður, at sandurin verður so stórur, at tað fer at forða fyri innsiglingini til bátahylin í Nesi. Somuleiðis verður mett, at sandurin kann forða teimum at draga bátarnar, sum eiga neyst við tað syðra landið.

Borgarstjórin sigur, at tað eru eini tvey ár síðani, at grivið varð seinast og tá hepnaðist tað væl.

– Men nú hevur áin flutt seg suðureftir aftur og sandur var aftur farin at leggjast og tí royna vit einaferð afturat.

Hann sigur, at hetta er ikki serliga dýrt, tí tað er ein dagur við gravimaskinuni.

# Fiska, ganga og hyggja eftir fuglum í Suðuroy

**Hetta vikuskiftið skipar ferðavinnan í Suðuroy fyri trimum forvitnisligum tiltøkum, sum bæði føroyingar og útlendingar kunnu fáa gleði av**

FERÐAVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Leygarkvøldið ber til at sleppa ío fjørðin við gomlu vágssluppuni Johonnu*

**Suðuroy:** Ferðavinnan í Suðuroy mennist alsamt. Alt hetta sæst aftur í, at tað verður alsamt skipa fyri fleiri og fleiri tiltøkum í Suðuroy.

Og hetta vikuskiftið verða ikki færri enn trý forvitnislig tiltøk á skránni, har tað bæði verður farið á sjógvin og í fjøllini.

### Søgulig gonguferð

Hetta ferðavinnu-vikuskiftið í Suðuroy byrjar leygarmorgunin við gonguferð úr Trongisvági til Fámjins.

Í tí sambandi koyrir bussur av Kunningarstovuni í Gamla Skúla í Vági kl. 10.00 leygarmorgunin og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30. Koyrt verður til kolanámini í Rangabotni, har gongutúrurin byrjar.

Gingið verður undir Gluggunum, um Oyrnaskarð og til vakra Kirkjuvatn. Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi úr Fámjin til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági. Gonguferð og bussferð kosta tilsamans 100 krónur fyri hvønn. Annars verður skipað fyri gonguferð hvønn leygardag og tá ið liðugt er, hava tey, sum við eru, gingið Suðuroynna á tamb, úr suðuri í norð, úr eystri í vest.

Staðkend heimildarfólk eru við á hvørjari gonguferð.

Mælt verður til at hava heit og góð klæði, góðar skógvar ella styvlar, matpakka og ein drekkamunn, við. Tey, sum hava møguleika til tað, skuldu eisini havt kikara og eitt kort yvir økið við.

### Í fjørðin við Johonnu

Leygarkvøldið verður so møguleikin at sleppa í fjørðin við søguligu sluppuni Johonnu. Tann fiskitúrurin byrjar leygarkvøldið klokkan 19 og varar í einar 2-3 tímar.

À Johonnu eru 8-9 snøri, men tey, sum vilja royna fiskieydnuna við tráðu kunnu sjálvandi taka hana við.

Kunningarstovurnar siga, at skiparin veit um okkurt gott fiskimið í Vágsfirði, so tað skuldi borið til at fingið nakrar fiskar.

Fiskitúrurin kostar 50,- fyri vaksin, men fyri børn er túrurin ókeypis.

Aftaná ferðina hevur Stóra pakkhús opið til klokkan 1 leygarkvøldið. Har verður tónleikur og okkurt fæst eisini til keyps.

### Eygleiða fuglar í Akrabergi

Seinasta tiltakið hetta vikuskiftið verður sunnudagin kl. 19.00. Tá verður farið í hagan í Akrabergi at hyggja eftir fugli. Hetta er ein léttur túrur, sum tekur umleið hálvan annan tíma.

Aksal Poulsen er staðkendur frásøgumaður á túrinum og tað skuldi borga fyri einum forvitnisligum túri, tí fa vita so nógv um fuglalív, sum hann.

Bussur fer av kunningarstovuni í Vági kl. 19.00. Bussurin koyrir aftur til Kunningarstovuna tá heiðatúrurin er liðugur.

Hesin túrurin kostar 50 krónur fyri hvønn tá ið busskoyringin er við.

Kunningarstovan sigur, at tað er avgjørt hent at hava kikara og eina fuglabók við. Og so er tað nokk heldur ikki so býtt at hava ein drekkamunn við, tí hann er altíð góður at fáa eitt góðveðurskvøld í haganum.

Í Akrabergi er nógvur fuglur, tí tað er oftani her, at hann fyrst nemur land. men har sæst eisini týðiligt, hvar tey hava skorið torv.

Hesin túrurin kostar 50 krónur.

Fólk kunnu melda seg til øll hesi tiltøkini á Kunningarstovuni í Vági á telefon 374342 ella 284342, innan fríggjdagin 2. juli kl. 16.00, ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480 ella á 284480. Men tilmelding til fuglatúrin er bara í Vági.

Seinasta freist at melda til tiltøkini er í morgin, fríggjadagin, kl 16.00.



# Ætla kanska at bíða til vanlukkan er hend



*Hans Olaf Andersen vísur okkum, hvar hann heldur at tað er neyðugt at tálma ferðsluna ígjøgnum Lopra*

**– Tað er undir ongum umstøðum bygdaráðið, sum hevur ábyrgdina av koyringini, tí tað hevur altíð hin einstaki bilførarin, sigur bygdaráðið**

FERÐSLUFORÐING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Lopra:** – Eg veit ikki, hvørjum teir bíða eftir. Kanska skal ein vanlukka henda fyrst.

Hans Olaf Andersen í Lopra sparir ikki krútið, tá ið hann skal siga sína meining um bygdaráðið.

Hann er sera ónøgdur við ferðsluviðurskiftini í Lopra, sum hann heldur, at kommunan ger ov lítið við.

– Vegurin inn til tey fyrstu húsini er hampiliga breiður. Men beint við tey fyrstu húsinmi, smalkar vegurin brádliga og vegurin ígjøgnum bygdina er sum ein smalur bygdarvegur.

Hesar umstøður gera, at bilførarar koma ofta við ferð av tí breiða vegnum, inn á tann smala bygdarvegin.

Og har er tað, sum so nógva aðrastaðni, at garðar eru stoyptir oman á vegin.

– Sostatt er útsýnið sera vánaligt frá teimum innkoyringum, sum eru.

Harafturat ganga vegir bæði omanfyri bygdina og undir bygdini, so tey, sum ikki hava ørindi í sjálvari bygdini, hava tveir møguleikar at koyra uttanum øll húsini.

Hesar umstøður gjørdu, at hann fór at tosa við bygdaráðið um at fáa eina ferðsluforðing við tey fyrstu húsini í bygdini.

– Fyrst varð málið avvíst. Men so hendi tað, at tað var upp á eitt hangandi hár, at langabbasonurin ikki varð yvirkoyrdur, tí børn duga ikki so væl at ansa eftir bilunum.

– Tá vendi eg mær aftur til kommununa og tá varð eg biðin um at senda málið skrivliga og tað gjørdi eg, saman við umleið 10 øðrum.

Tann 12. august 2002, samtykti kommunan at seta eina ferðsluforðing upp, sum skuldi avmarka ferðina til 30 kilometrar um tíman. Samstundis skuldi skelti setast upp, sum ásetti mest loyvdu ferð til 30 kilometrar um tíman.

Bygdaráðið helt at hetta skuldi tálma ferðsluni, sum kemur inn í bygdina, eins og tað skuldi gjørt, at bilar, sum fara út bygdini, ikki fáa sett ferðina upp, fyrrenn teir eru komnir útum.

Men tíðin gekk og onki hendi!

Tá ið eitt ár varð farið, vendi eg mær aftur til bygdaráðið. Tá kom bygdaráðið á staðið, saman við løgregluni og einum umboði fyri Landsverk.

– Har varð tosað um, at klókast hevði verið at sett tvær ferðsluforðingar upp, tí tá ið farið varð undir arbeiðið, var meirkostnaðurin lítil og ongin av at gera tvær.

– Hetta kom so aftur fyri í býgdaráðnum tann 20. august í 2003. Men tá samtykti bygdaráðið, at ein ferðsluforðing afturat skuldi ikki gerast nú.

Men samstundis staðfesti bygdaráðið, at ferðsluforðingin, sum longu varð samtykt, skuldi gerast eftir summarfrítíðina.

Hans Olaf Andersen sigur, at nú er so aftur eitt ár farið aftur um bak og enn er ongin ferðsluforðing gjørd.

– Eg vendi mær fyri einum álvum ári síðani til Landsverk og haðani fekk eg at vita, at ongin ferðsluforðing verður gjørd, tí kommunan sigur, at hon hevur ikki ráð.

Hans Olaf Andersen hevur fingið at vita, ein ein slík ferðsluforðing kostar einar 15.000 krónur.

Hann sigur, at hann nú hevur hann enn einaferð afturat vent sær til bygdaráðið, so at ein ferðsluforðing kann setast upp, áðrenn ein vanlukka er hend.

### Bilførarin ábyrgdina

Jacob Vestergaard er borgarstjóri í Sumbiar Kommunu, sum Lopra er í.

Og hann heldur ikki, at tað er rímiligt at geva kommununi skyldina, skuldi ein vanlukka hend.

– Tað er altíð bilførarin, sum hevur ábyrgdina av, hvussu hann koyrir og ikki kommunan, staðfestir hann.

Men hinvegin er hann ikki ósamdur í, at kommunan eigur at gera viðurskiftini so trygg sum gjørligt og har heldur hann, at ein ferðsluforðing á bygdarvegnum í Lopra hevði ikki verið óhóskandi.

Sostatt hevur málið nú á triðja sinni verið fyri á bygdaráðsfundi. Og har var á triðja sinni samtykt at geva umrøddu ferðsluforðing.

Samstundis verður arbeitt við málinum at seta skelti upp, sum avmarka ferðina til 30 km/t, men í hesum sambandi skulu bæðu løgregla og Landsverk góðkenna tað, so tað tekur sína tíð.

## Norðurlendsk yvirlýsing um musikkskúlan

**– Tilboð um undirvísing í tónleiki mugu raðfestast hægri. Hetta sigur felagið fyri 15.000 norðurlendskar tónleikalærar í yvirlýsing**

TÓNLEIKA-UNDIRVÍSING
*Yvirlýsing*

Norðurlendska felagið fyri undirvísarar í tónleiki (NUMU), sum umboðar 15.000 tónleikalærarar og leiðarar í øllum Norðurlondum, ger vart við, at umstøðurnar til sang- og tónleikaundirvísing tey seinastu árini eru versnaðar bæði í fólkaskúla og musikkskúla.

NUMU vil minna á, at luttøka og upplæring í tónleiki og øðrum listagreinum er týdningarmikil partur av teirri uppaling, ið børn og ung í Norðurlondum eiga at fáa.

Undirvísingin eigur at vera skipað so, at øll hava møguleika at vera við uttan mun til fíggjarligar og geografiskar fyritreytir.

Myndugleikar eiga við almennari fígging at tryggja, at skúlar og lærugreinar framhaldandi mennast, og at bíðilistar verða avgreiddir.

Áheitan okkara er:

Tilboð um undirvísing í tónleiki mugu raðfestast hægri!

## Tinganest við fløgu

**Vágabólkurin Tinganest hevur givið út fløgu við 16 av teimum góðu gomlu løgunum, sum bólkurin er kendur fyri**

FLØGUÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Góði gamli tónleikabólkurin Tinganest hevur gjørt eitt skarvslop inn í nýggju tøkniøldina. Teir hava funnið tey stóru spolabondini fram úr bandagoymsluni hjá Útvarpi Føroya og fingið ein av fremstu ljóðteknikkarunum í Danmark at flyta teirra tónleik yvir á fløgu við tí allarnýggjastu tøknini, sum er á marknaðinum í dag.

Sambært heimasíðuni www.mastertouch.dk hevur hesin ljóðsnillingur, Lehnert Kjeldsen, arbeitt fyri Kim Larsen, Aqua, Laid Back, Sanne Salemonsen og mong, mong onnur donsk toppnøvn, umframt fyri so fræg føroysk nøvn sum Clickhaze, Teitur og Týr. Úrslitið er eisini avbera gott, soleiðis at ljóðgóðskan á fløguni er langt omanfyri hana, sum er á teimum kassettubondunum, sum teir góvu út í sínari tíð. Ongantíð hava teir ljóðað fagrari enn nú.

Og har eru landaplágurnar í einari perlurøð: Upp á tá, Vágagellan, Annan sang, Babba - klingandi klárt og ein fragd fyri oyrað.

Lýsingarstovan Krea í Saltangará hevur gjørt snotuliga fløguhúsan, sum er prýddur við einum so fittum vínsnigli. Inni í húsanum liggur hefti við tekstunum til allar 16 sangirnar, sum eru á fløguni – umframt at har eru forvitnisligar myndir av bólkinum. Eisini er í heftinum grein um bólkin, sum Høgni Djurhuus, útvarpsmaður, hevur skrivað.

Heitið á fløguni er »Tinganest – Longst sum best«. Víst so. Hesir heldur løgnu sniglarnir í føroyska tónleikaheiminum hava við hesari fløguni víst, at teir bæði duga at skunda sær spakuliga – og at renna um kapp við tíðina.




Annars hoyrist graml um, at bólkurin so smátt er farin undir at gera nýtt tilfar at geva út.